## Steingrímur 80

Ein av teimum kendu íslendsku politikarunum frá seinastu øld, Steingrímur Hermansson, fylti 80 ár nú um vikuskiftið. Steingrímur Hermansson var formaður í Framsóknarflokkinum, hann var altingsmaður í mong ár og forsætisráðharri eitt áramál. Í sambandi við 80 ára dagin skipaði Framsóknarflokkurin fyri serligum hátíðarhaldi við røðum, kórsangi og tónleiki. Millum teirra, sum hildu røðu, vóru íslendski forsetin, Ólafur Ragnar Grímsson.



*Steingrímur Hermansson (Mynd: Vísir)*

## Kjakast um uran

Skulu námsvinnufeløg fáa loyvi at útvinna uran úr grønlendsku undirgrundini? Tann spurningin eru grønlendskir politikarar ikki samdir um. Í 1988 samtykti Landstingið, at uran skal ikki útvinnast í Grønlandi, men landsstýrismaðurin Kim Kielsen, sum umsitur ráevnini, vil nú hava málið endurskoðað. Millum teirra, sum siga nei, er tingmaðurin Johan Lund Olsen úr IA, sum vísir á heilsuvandan við urani, sum eisini dálkar umhvørvið illa, sigur hann.

Fiskidaganevndin ikki samd:

# Meirilutin mælir til óbroytt

**Fiskidaganevndin heldur, at myndugleikarnir eiga at fylgja gjøllari við hjáveiðini hjá føroysku og útlendsku svartkjaftaskipunum. - Vit hava framvegis ta fatan, at svartkjaftaflotin fiskar nógvan botnfisk sum hjáveiði, og vit halda, at stóra svartkjaftaveiðan undir Føroyum hevur beinleiðis ávirkan á støðuna hjá okkara fiskastovnum, sigur fiskidaganevndin**

TILMÆLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fiskidaganevndin hevur nú latið landsstýrismanninum í fiskivinnumálum sítt tilmæli um fiskidagar fyri komandi fiskiár, sum byrjar 1. september.

Nevndin er sett saman við umboðum fyri ymiskar skipabólkar, har Dánjal Jacobsen umboðar partrolarar, Theodor Poulsen umboðar trolbátar, Auðunn Konráðsson umboðar útróðrarmenn, Dánjal J. Vilhelm umboðar línuskip og Eyðun Johannesen umboðar Føroya Fiskimannafelag.

Formaður í fiskidaganevndini er Óli Samró og skrivari er Hertha Olsen.

Uppgávan hjá fiskidaganevndini er at lata landsstýrismanninum metingar um støðuna í botnfiskastovnunum og tilmæli um fiskidagar, eins og nevndin ger sínar metingar um, hvussu fiskiskapurin skal skipast komandi fiskiár.

Nú nevndin hevur arbeitt við sínum tilmæli, hevur hon havt tilsamans seks fundir.

Í síni støðulýsing, sigur fiskidaganevndin, at samlaða dagatalið, síðan fiskidagaskipanin varð sett í verk í 1996, er minkað við 26%.

Bólkur 2 hevði í 1996 7.199 dagar og hevur í dag 5.143 dagar. Tað er ein minking upp á 29%.

Bólkur 3 er øðrvísi í dag, tí skip í bólki 4 eru komin inn í hendan bólkin og hava tikið dagar við sær. Her er fiskidagatalið økt við 29%.

Í bólki 4 er dagatalið minkað úr 9.328 døgum niður í 3.404 dagar. Tað er ein minking uppá heili 64%.

Í bólki 5 hevur dagatalið verið skiftandi, upp og niður, men samanborið við 1996, er dagatalið í hesum bólki minkað við 17%.

Sambært broytingunum í dagtalinum í hvørjum bólki sær, kemur fiskidaganevndin til, at samlaða dagatalið árini 1996-2008 er minkað við tilsamans 26%.

### Fiskastovnarnir

Fiskidaganevndin hevur eisini hugt upp á veiðina eftir eitt nú toski, hýsu, upsa, longu, brosmu, havtasku og flatfiski.

- Vit hava fyri hvønn skipabólk sær og á ymisku leiðunum hugt eftir, hvussu fiskiskapurin sær út – í nøgd, støðd, og hvussu fiskurin er fyri, og eisini hevur verið mett um, hvussu støðan er við ætinum.

Fiskidaganevndin byggir síni úttalilsir á eygleiðingar hjá teimum, sum hava sítt dagliga yrki á sjónum.

- Vit hava ikki vísindaligar royndir ella annað taltilfar at vísa á enn tað, sum er alment, sigur nevndin.

Fiskidaganevndin heldur, at støðan hjá toskastovninum hevur ikki verið góð í trý ár, men nevndin heldur kortini, at rímiliga nógv er til av stórum toski. Veiðunøgdin av toski fyri hvønn bólk sær er eitt sindur minni í ár enn í fjør.

Útróðrarflotin metir, at hýsan er á einum lágum støði, men størru skipini meta, at nakað tað sama er til av hýsu, sum verið hevur seinastu 2-3 árini.

- Vit meta, at upsin er væl fyri, og vit meta eisini, at longa, brosma, havtaska, tunga og reyðsprøka eru væl fyri.

Fiskidaganevndin sigur seg ikki hava kunnleika til at meta um støðuna hjá svartkalva og kalva undir Føroyum.

Um toskin annars, sigur nevndin, at veiðan seinastu 12 mánaðirnar hevur verið 11.355 tons, sum er tað minsta, ið veitt er av toski seinastu 10 árini.

- Toskaveiðan býtt eftir stødd er støðug. Nógv mest verður veitt av toski 2, 3 og 4, men nøgdin av toski 2 er lutfalsliga størri í ár enn undanfarin ár. Fiskimenn hava heft seg við, at minni er til av smærri toski og lutfalsliga meira av stórum toski .

Nevndin vísir eisini á, hvussu toskaveiðan býtir seg millum ymisku skipabólkarnar, og her kemur nevndin til, at línuskipini veiða 34%, smábátar í bólki 5 veiða 22%, lemmatrolarar 18%, bólkur 4A og B 12%, partrolararnir 7% og trolbátar 6%.

- Tað eru serliga smábátar í bólki 5, sum fiska tann smáa toskin. Hesir veiða meira enn helmingin av toski 5 og ein triðing av samlaðu veiðini av toski 4. Hetta býtið hevur verið tað sama í nógv ár.

Frítíðarfiskiskapur í hesum bólki er ikki skrásettur.

### Nógv at eta

Um samlaðu botnfiskaveiðina undir Føroyum, sigur fiskidaganevndin, at hendan var størst í fiskiárinum 2002/2003. Tá var veiðan 132.000 tons. Men veiðan var eisini góð fiskiárið 2005/ 2006, og tá er tað serliga upsin, sum gevur útslag.

- Síðan er samlaða veiðan minkað nakað, og fyri fiskiárið 2007/ 2008 er hon minkað heilt niður í 102.000 tons. Fiskasløgini, sum hava havt stóra afturgongd í



veiðu, eru toskur, hýsa, kongafiskur og svartkalvi. Hinvegin er upsaveiðan økt, og serliga fiskiárið 2005/ 2006 var eitt gott upsaár.

Nevndin vísir á, at veiðan eftir gulllaksi er skiftandi ár undan ári, men í fjør royndist veiðan væl.

Vit kunnu skoyta uppí, at gulllaksaveiðan í verandi vertíð eisini hevur verið góð – og kanska betri enn seinasta ár.

Fiskidaganevndin heldur, at nógv er til av æti á øllum leiðum, eisini á Føroyabanka, og at fiskurin undir Føroyum sum heild er væl fyri.

- Okkara meting er, at nóg mikið er til av føði, sigur nevndin.

### Stór hjáveiða

Fiskidaganevndin vísir á, at tilmælini, sum nevndin er komin við ár undan ári, ikki eru fylgd, og tí heldur nevndin, at neyðugt er við nøkrum endurtøkum av tí, ið áður er sagt.

- Vit halda, at myndugleikarnir eiga at fylgja gjøllari við hjáveiðini hjá føroysku og útlendsku svartkjaftaskipunum. Ein skipan eigur at verða sett í verk við eftirlitsfólki umborð á pelagisku skipunum, sum